StÍF-VÍF 31-25 (16-11):

# Vestmenningar koppaðu

**VÍF, sum annars hevur verið einaráðandi seinnu árini, fekk av at vita á Skála, har eitt væl upplagt heimalið við ferðmiklum spæli sendi gula herin í gólvið**

HONDBÓLTUR-MENN
*Jákup Mørk*

Seinastu tvey árini hevur tað verið VÍF, sum hevur sett dagsskránna í føroyskum hondbólti á bæði mans- og kvinnusíðuni, men soleiðis tykist tað ikki verða í ár. Í øllum førum skuldu tað hesu ferð bert ganga tríggir dystir, áðrenn mansliðið rendi seg í fyrsta tapið, og tað hendi – sjálvandi – á Skála. Sjálvandi, tí er tað nakað lið, sum hevur dugað at vunnið vestmenningum neisur hesi bæði seinastu árini, so er tað júst StÍF, sum fleiri ferðir hevur argað, og tað enntá somikið nógv, at teir tvey ár á rað hava kunnað rópt seg steypavinnarar.



*Costin Dumitrescu og hansara menn í StÍF tykjast longu nú hava fingið ferðina upp í hægsta gear, og hetta fingu vestmenningar at kenna sunnudagin*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

### Ferð á verjuni

Sunnudagin var sjáldan nakar ivi um, hvat av liðunum var hitt betra, men tað var serliga í løtunum kring steðgin, at strandingar sýndu, júst hví teir hava átt ein leiklut í føroyska hondbóltsoddinum seinnu árini.

Verjuspælið við einum stórleikandi Marian Cirloganescu aftan fyri seg riggaði til fulnar. Aloftast vórðu vestmannaálopini steðgað, áðrenn tey gjørdust rættiliga vandamikil, og so gekk tað skjótt hinvegin. Ofta tóktist vestmenningar mest sum dólskir, tá strandingar við fáum kvikum flytingum leiktu seg niðan til málið, og av tí sama møddust vestmenningarnir meira enn gott var. StÍF hinvegin nýtti fáar kreftir, tí talan var ofta bert um ein ella tveir leikarar, sum runnu kontra, meðan hinir fingu eina góða hvíld afturi í verjuni.

Nakað av hesum taktum, sum miðskeiðis í dystinum avgjørdu tað heila, vóru eisini at síggja fyrstu løtuna av dystinum.

StÍF fekk alt fyri eitt gott tak á tungu skjúttunum hjá VÍF, soleiðis at hesir ikki sluppu alt ov væl framat. Roynt varð at treingja spælið saman á miðjuni, soleiðis at VÍF noyddist út í borðini við skotroyndunum, og hetta eydnaðist til fulnar. Ikki minst tí Marian í málinum alt fyri eitt fekk eitt sera gott tak á John Zachariasen.

Hetta gjørdi, at StÍF slapp eitt sindur frá møtstøðuni tíðliga í dystinum, men spakuliga var tað tó so, at VÍF aftur skapti spenning í. Vengirnir byrjaðu brádliga at skora, og so fingu strandingar ikki longur koyrt kontr-spælið, sum annars hevði riggað so væl.

Stutt undan steðginum fekk heimaliðið tó aftur glið á. Uppskriftin var framvegis hin sama, og í løtunum eftir steðgin hildu teir sum nevnt á við sama lag. Eitt skifti sá út til, at VÍF skuldi vera fyri rættiligum avsmurningi, men lukkutíð fyri teir, so setti heimaliðið ferðina nakað niður seinasta korterið, og hugsaði mest um at koyra sigurin heim.

### Trúnan ridlar

Og tað varð eisini gjørt. Gaman í fekk VÍF minkað munin úr 10 niður í seks mál, men í vanda kom sigurin ongantíð. Og nakað so langt ífrá.

Sum nevnt, so varð sigurin grundaður á gott verju- og málmansspæl, og megna strandingar at halda fast um hetta, so er eingin ivi um, at teir fara at gerast eitt veruliga gott boð upp á eina møguliga topp-plasering í ár. Kanska er enn nakað tíðliga at staðfesta møguleikan, men vanliga hava strandingar verið munandi sterkari eftir jólasteðgin, og um so verður aftur í ar, verður ikki lukkuligt at standa fyri, tá Costin, Artur, Sveinur og hinir koma stormandi niðan eftir vøllinum.

Fyri vestmenningar var dysturin hinvegin ein staðfesting av, at teir í øllum førum ikki koma spadserandi til nakað í ár. Tað høvdu teir sum kanska heldur ikki roknað við, men vandin lúrir altíð, tá tú hevur verið somikið einaráðandi tvey ár á rað. Enn er kanska ov tíðliga at siga nakað um eitt maktskifti í føroyskum hondbólti, men eftir stigatalvuni at døma, verður talan í øllum førum um eina væl meira spennandi kapping í ár, sammett við seinasta ár.

**Dysturin í tølum:**
**StÍF-VÍF 31-25 (16-11)**
Málskjúttar:
StÍF: Sveinur Justinussen 10(1), Dostin Dumitrescu 7(5), Artur Johansen 5(1), Andre F. Danielsen 5, Alexandur Johansen 2, Jón Rasmussen 1, Kristjan Petursson 1
VÍF: Áki Olsen 6, John Zachariasen 6, Piti Negru 6(2), Ingi Olsen 4, Fríðbjørn Seloy 1, Áki G. Olsen 1
Brotskøst: StÍF 7, VÍF 4
Útvísingar: StÍF 5, VÍF 4
Dómarar úr Tjaldri: Trygvi Mortensen & Kári Hansen: Høvdu ikki alla tíðina eins gott tak á, og ivaðust eina einstaka ferð í reglunum, men koyrdu tó kortini nógv heim upp á rutinuna, sum nú er um at verða, so sum hon eigur at vera.

Stjørnan-StÍF 24-22 (13-10):

# Agne bjargaði Stjørnuni sigurin

**Við sterkum spæli í málinum í avgerandi løtuni í seinna hálvleiki, var Agne Masenaite høvuðsorsøkin til sigurin hjá Stjørnuni móti StÍF**

KVINNUHONDBÓLTUR
*Hilmar Jan Hansen*

Heldur Agne Masenaite fram við spælinum, hon higartil hevur víst í málinum hjá Stjørnuni, er hon heitur kandidatur til heiðurin sum »Ársins málverji«, tá hondbólturin komandi vár aftur verður í galla-hýri.

Trý stig hava tær í Stjørnuni fingið higartil, og ikki er at taka munnin ov fullan, um sagt verður, at Agne eigur størsta partin av teimum — umframt at hon eisini hevur hildið lív í Stjørnuni sum longst í teimum báðum taptu dystunum.

Sunnudagin hevði StÍF fingið fatur í rætta endanum og var á veg at tryggja sær sigurin, tá Agne spílaði seg út og gav teimum í Stjørnuni nýggjar vón og nýggjar kreftir.

Miðskeiðis í seinna hálvleiki hevði StÍF vunnið seg frá at vera aftanfyri við trimum málum til at vera á odda við tveimum. Tær hjá Stjørnuni, sum hesa løtuna brendu tvey brotskøst, dugdu ikki at síggja annað enn at tap stóð í hendi!

### Agne tók alt

Við leiðsluni 19-17 fór StÍF í vælmannað skjótálop fyri at geva Stjørnuni mønustingin, men trimum skotroyndum í sama álopi vardi Agne fyri, og so var tað brádliga, at dysturin vendi.

Nú raknaði Stjørnan við aftur. Hóast verjan kanska ikki spældi upp til sítt besta, tók Agne alt, sum kom innum, og næstu løtuna fekk Stjørnan fimm mál og einki fór ígjøgnum.

Nú var støðan brádliga 23-19 til Stjørnuna — og bara einir fimm minuttir eftir.

Sjálvt um StÍF royndi at koma innaftur í dystin, lá ikki nóg væl fyri síðstu løtuna, samstundis sum gloppið var ov langt, og Stjørnan fekk sostatt hálað sín fyrsta sigur í land.

Sigurin gav Stjørnuni eitt sindur av luft, og nú er samlaði fongurin trý stig, meðan StÍF við sínum báðum stigum enn bert er oman fyri Tjaldri við ongum.

**Dysturin í tølum:**
**Stjørnan-StÍF 24-22 (13-10)**
Málskjúttar:
Stjørnan: Natasja Stamenkovic 9, Danijela Ercevic 5 (2), Súsanna Hansen 4, Jastrid Gullaksen 3, Una Olsen 2, Gunvør Isaksen 1
StÍF: Alina Olaru 7 (1), Asta Petraukieke 6, Anna B. Danielsen 5, Poula B. Olsen 3, Elin Jacobsen 1
Brotskøst: Stjørnan 6, StÍF 1
Útvísingar: Stjørnan 7, StÍF 2
Dómarar: Kristian Johansen og Sámal Hansen



VB-VÍF 23-19 (11-11):

# Vágskvinnur vístu VÍF durafjórðingin

**Í einum góðum og spennandi dysti í Vági megnaðu VB-kvinnurnar við einum góðum innsatsi og stórum stríðsvilja at vinna á greipuvinnarunum síðstu tvey árini**

KVINNUHONDBÓLTUR
*Hilmar Jan Hansen*

Líkasum alt í Vági snúði seg um fótbólt fyri tveimum árum síðani, hoyrist nú bara hondbóltsprát allastaðni. Orsøkin er, at VB-kvinnurnar hava staðið seg so væl við sínum nýggja liði, at tær eru bestar í bestu kvinnudeildini.

Var mótstøðan kanska ikki tann størsta í dystunum móti Stjørnuni og Tjaldri herfyri, so kundi ikki roknast við løttum dysti sunnudagin, tá VÍF kom á vitjan.

Hinvegin hevði onkur bjartskygdur vágbingur skrivað sær aftan fyri oyrað, at VB jú í fjør var einasta liðið, ið vann á VÍF. Og at hetta tí ikki var ómøguligt hesa ferð heldur …

Og so var eisini, tí VB vann góða, spennandi og dramatiska dystin í Vági sunnudagin við fýra málum. Eftir javnleik 11-11 í hálvleikinum royndust VB-kvinnurnar betur í seinna hálvleiki og vunnu at enda dystin 23-19.

### Onga útskifting

Sigurin hjá VB var grundaður á stóran stríðsvilja og ein góðan innsats av øllum — og tað vóru tær somu, ið spældu allan dystin á tamb — tí VB gjørdi onga útskifting!

Eitt skifti í seinna hálvleiki vóru tekin um, at kreftirnar vóru um at ganga undan hjá VB, men so bleiv aftur undanbrekka.

Verjan tók sær av tí, ið væntast kundi av henni ein góðan dyst, og málverjin Daina Ilaite stóð serliga móti endanum sera væl í málinum, so ikki bar til hjá VÍF at fáa bóltin fram við henni nóg ofta.

VÍF tóktist hinvegin ikki rættiliga at hava neyðuga fótafestið í dystinum, men sá hinvegin heldur ikki út til at undirmeta VB.

Í verjustøðu brúkti VÍF onkuntíð 5-1 og onkuntíð 6-0, og onkuntíð mansvardi VÍF báðar tær litavisku og onkuntíð bara aðra.

Einasta støðuga hóttanin hjá VÍF var Sóley Mikkelsen, ið skjeyt næstan helvtina av málunum hjá vestmannakvinnum, men eisini brendi tvey brotskøst.

### Dramatikkur

Eftir ein javnan fyrra hálvleik gjørdist tað sera spennandi og ikki sørt dramatiskt í høllini í Vági, tá liðini í seinna hálvleiki skiftust um at hava yvirtakið og at vera undir.

VÍF tóktist koma betur frá byrjan í seinna hálvleiki, men VB svaraði aftur. Frá 12-14 fór VB upp á 15-14.

VÍF royndi eina ferð aftrat, og meðan VB brendi brotskast og aðrar stórar kjansir, bardi VÍF seg framum av nýggjum og kom á odda 17-15.

Hesa løtuna sá út til, at VÍF — sum so mangan fyrr — skuldi avgera dystin og stýra trygt móti sigrinum.

Men VB vildi tað enn eina ferð øðrvísi og svaraði aftur, samstundis sum tað nú vóru tær úr Vestmanna, sum gjørdi feilir og mistøk, ið kostaðu.

Restina av dystinum átti VB yvirvágina og fekk skorað neyðugu málini, so VÍF ongantíð aftur kom inn í dystin. Og teir síðstu seks minuttirnar fekk VÍF einki mál!

Spennandi verður nú at síggja, um VB eigur tað, sum skal til at halda fast við góðu gongdina, og eisini verður áhugavert at síggja eftir teir næstu dystirnar, um VÍF bara haltar nú í byrjanini, ella um liðið ikki longur hevur suverenan status, eins og tvey tey síðstu kappingarárini.



*VB hevur sýnt góðar taktir í ár, og sunnudagin krimaði av álvara, tá tvífaldu greipuvinnararnir úr VÍF vórðu sendar stigaleysar norður um Suðuroyarfjørð*

**Dysturin í tølum:**
**VB-VÍF 23-19 (11-11)**
Málskjúttar:
VB: Arnleyð Hjelm 8, Laila Jespersen 5, Daiva Toumaite 5 (2), Reda Kurkauskiene 2 (1), Guðrun Midjord 2, Anja Magnussen 1
VÍF: Sóley Mikkelsen 9, Jacklyn Durhuus 2, Nikolina Eyðbjørnsdóttir 2, Ioana Rapa 2 (1), Alis Høghamar 1, Fríða Marjunardóttir 1, Nicoleta Radu 1, Hertha Simonsen 1
Brotskøst: VB 5, VÍF 4
Útvísingar: VB 3, VÍF 3
Dómarar: Birgir Dimon og Kári Niclasen

Neistin-Tjaldur 29-27 (10-14):

# Tjaldur tók seg saman

**Eftir ávaringina um at taka felagði úr kappingini vaknaði Tjaldur úr dvala, og tað var um reppið, at teir fingu stig móti Neistanum**

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Í leygardagsútgávu okkara segði Ragnar Olsen, formaður í Tjaldri, at støðan í felagnum var somikið álvarslig, at menn umhugsaðu at taka besta mansliðið úr kappingini, um ikki annað skil kom á uppmøtingina til venjing og hugburðin til dystirnar annars.

Eftir øllum at døma hevur hetta hjálpt nakað. Í øllum førum hevur reglulig venjing verið í Runavíkini seinastu vikuna, og sunnudagin skuldi hetta so standa sína roynd, tá Tjaldur vitjaði Neistan.

### Lupu hvøkk á

Og eftir øllum at døma hava venjingarnar hjálpt. Kanska var tað ikki nóg mikið til stig hesaferð, men Tjaldur var alla tíðina heilt væl við í dystinum. Eftir eina javna byrjan tóku gestirnir spakuliga yvir, og tá farið varð til hálvleiks, vóru teir á odda við fýra málum.

Gongdin helt sær nakað væl inn í seinna hálvleik. Neistin stríddist manniliga fyri at koma inn aftur í dystin, men tað var sum um einki vildi bera til hjá teimum, og tá Tjaldur so eisini hevur ein av landsins bestu málverjum í Dejan Lacok var leingi líkt til, at tað skuldi eydnast gulu monnunum at vinna ein sera óvæntaðan sigur.

Tá alt kom til alt, so vórðu tað tó heimamenninir, sum fóru avstað við sigrinum. Betra venjingarstøðan merkti, at teir seinastu løtuna kundu renna Tjaldur um koll, og tá teir fyrst høvdu lagt seg framum, vóru ongar kreftir eftir hjá gestunum at toga seg upp.

Sostatt eydnaðist Neistanum at halda fast í oddasessinum á stigatalvuni, har teir eru ájvanir StÍF í eini higartil sera spennandi kapping, har fimm tey fremstu liðini hava tapt ein dyst hvør.

Tjaldur er hinvegin framvegis stigaleyst í botninum, men dysturin sunnudagin gav tó vónir um, at betri tíðir eru ávegis. Megna leikararnir at fáa venjingarstøðuna upp har, sum hon eigur at vera, er í øllum førum ikki óhugsandi, at runavíkingarnir eins og í fjør av og á fara at spæla ovaru støddu liðunum eitt puss.

**Dysturin í tølum**
**Neistin-Tjaldur 29-27 (10-14)**
Málskjúttar:
Neistin: Morgan Knezevic 8(1), Ragnar Stakksund 5, Helgi Justinussen 5, Áki Mørk 4, Kári Mortensen 2, Jón Ludvig 2, Birgir Kass 1, Dann Thorleifsson 1, Helgi Michelsen 1
Tjaldur: Dragisa Stojovic 9(1), Arnfinn Langgaard 6, Zoran Sarcevic 5, Áki L. Hansen 3, Ragnar S. Olsen 2, Tórhallur Thomsen 2(1)
Brotskøst: Neistin 3, Tjaldur 4
Útvísingar: Neistin 2, Tjaldur 4
Dómarar úr H71: Hallur Danielsen & Jákup S. Simonsen